

*Tað er ongin ivi um, at tað er Ingaborg Vinther, sum limirnir í Føroya Arbeiðarafelag vilja hava at standa á odda fyri felagnum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Ingeborg fekk aftur fullan stuðul

**– Stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag er óbroytt, eftir at stjórnarval var hósdagin**

STJÓRNARVAL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag heldur fram óbroytt í eitt valskeið afturat.

Tað er greitt eftir stjórnarvalið á aðalfund felagsins hósdagin.

Tað er somuleiðis greitt, at forkvinna felagsins seinastu 25 árini, Ingeborg Vinther, framvegis skal standa á odda fyri felagnum tey bæði næstu árini.

Hon varð nevniliga enn einaferð vald til forkvinnu í Føroya Arbeiðarafelag og tað at kalla einmælt eisini. Og heldur ikki hesuferð hevði hon nakað mótvalevni.

Ingeborg Vinther gjørdust forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í 1980 og síðani er hon afturvald 12 ferðir uttan so mikið sum at hava havt eitt tað einasta mótvalevni nakrantíð og tað hevði hon heldur ikki hesuferð.

Sostatt hevur tað ongantíð verið nakrar ivi um, hvønn limirnir vilja hava at standa á odda fyri felagnum.

Tveir aðrir nevnarlimir stóðu eisini fyri vali í dag. Teir vóru Karla Einarsson og Poul Juul Festirstein og tey vórðu bæði afturvald.

Somuleiðis vórðu eykalimirnir afturvaldir. Jan Nielsen er fyrsti tiltakslimur, Osmundur Berg er annar tiltakslimur og Jógvan Páll Johansen er triði tiltakslimur.

Hini í nevndini, sum ikki stóðu fyri vali hesuferð, eru Georg F. Hansen, næstformaður, Agnar Olsen, Margretha Rasmussen og Sunrid Vang.

# Skulu arbeiða fyri at fáa verkfalsstuðul

**Tá ið verkfall er, kunnu verkafólk, sum ganga hendur í lumma, ikki krevja verkfalsstuðul**

VERKFALSTUÐUL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tann, sum vil hava verkfalsstuðul, tá ið verkfall er, má arbeiða fyri hann.

Nú samráðingarnar ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar eru við at fara inn í avgerandi løtuna, brúkti Ingeborg Vinter aðalfundin hjá Føroya Arbeiðarafelag sum eitt kærkomið høvið til at minna fundarfólkið á, hvørjar treytirnar eru fyri at fáa stuðul úr verkfalsgrunnunum hjá fakfeløgunum.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag legði dent á, at fyri at fáa verkfalsstuðul, skal ein limur í einum fakfelag eisini taka lut í teimum tiltøkum, sum fakfelagið skipar fyri í eini verkfalsstøðu.

Hon vísti á ein dóm, sum nýliga er sagdur í gerðarrættinum

Eftir verkfallið í 2003 var tað ein limur í einum lokalfelag hjá Føroya Arbeiðarafelag sum kravdi at fáa verkfalsstuðul frá felagnum, hóast tað kundi prógvast, at viðkomandi hevði ikki verið við í teimum tiltøkum, sum feløgini skipaðu fyri undir verkfallinum.

– Dómurin í gerðarrættinum staðfesti, at ein limur, sum ikki tekur lut í teimum tiltøkum, sum feløgini skipaðu fyri, kann heldur ikki ikki krevja verkfalsstuðul,

Hon segði, at sostatt kunnu vit staðfesta, at treytin fyri at fáa verkfalsstuðul, er, at verkafólk eisini røkja sínar skyldur mótvegis fakfelagnum við at taka lut í teimum tiltøkum, sum felagið skipar fyri í eini verkfalsstøðu.

Ingeborg Vinther sigur, at henda niðurstøða er heilt natúrlig, tí ein meginregla í fakfelagsrætti, er, at rættindi og skyldur fylgjast.

– Vil ein limur ikki halda sínar skyldur mótvegis felagnum og fakfelagsrørsluni sum heild, so kann hesin limur sjálvsagt heldur ikki krevja nøkur rættindi frá felagnum, sigur Ingeborg Vinther.

# Arbeiðsgevarar halda ikki uppsagnartíðina

**Ein heilt stórur trupulleiki hjá Føroya Arbeiðafafelag er, at arbeiðsgevarar ikki virða reglarnar um uppsagnartíð**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Arbeiðsgevarar eru ógvuliga trekir at halda uppsagnartíðina, tá ið arbeiðsfólk verða søgd úr starvi.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag hósdagin, segði forkvinnan, Ingeborg Vinther, at tað er ein stórur trupulleiki, at arbeiðsgevarar ikki halda uppsagnartíðina, tá ið arbeiðsfólk verða søgd úr starvi vegna vinnuloysi.

Í formansfrágreingini segði hon, at hetta hevur serliga gjørt seg galdandi í alivinnuni.

Tað er heilt vanligt, at arbeiðsgevarar royna at sleppa sær undan at rinda løn í uppsagnartíðini.

– Vit hava havt nógv mál, har vit hava verið eftir virkjum, ið ikki hava hildið sáttmálan og uppsagnartíðina, segði Ingeborg Vinther.

Hon legði afturat, at í øllum málum, har limir hava vent sær til fakfeløgini við klagum um, at teir hava verið fyri órætti í sambandi við uppsøgnini hava tey fingið hetta í rættlag, so limurin hevur fingið tað, hann eigur.

– Men tað hevur ofta verið við tógvið stríð.

Hon sigur, at tað er verri hjá teimum ið ikki siga feløgunum frá, men lata sær lynda at verða snýtt fyri eitt nú uppsagnartíð.

– Tíverri tykist tað so, at beinan vegin, vit hava vaksandi arbeiðsloysi, eru tað nakrar virkisleiðslur, ið gera sær dælt av hesum og halda seg kunna fara við starvsfólkinum, sum teimum tykir best.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at oftani siga fólk ikki fakfeløgunum frá, tá ið tey eru fyri órætti, tí ræðast at missa arbeiðið.

– Tí er umráðandi, at bæði álitisfólk og fakfeløgini fylgja væl við og gera vart við seg, so vit fáa steðgað slíkum óskili.